## 13 ára gamal knívstingari



Knívstinging er ein alsamt vaksandi trupulleiki, ikki bert í Onglandi, men eisini í Danmark. Og knívstingararnir gerast yngri og yngri. Í nátt stakk ein 13 ára gamal drongur eina 17 ára gamla gentu og rændi fartelefonina frá henni. Hon hevði verið ein túr í býnum saman við einum vinmanni og einari vinkonu, tá tann 13 ára gamli saman við tveimum javnaldrum fyrst royndi at ræna frá vinmanninum, men tá hesum eydnaðist at renna burtur, gekk tað út yvir gentuna. Hendingin fór fram á Strøgnum um tvey tíðina í nátt og longu 35 minuttir seinni hevði løgreglan handtikið teir tríggjar dreingirnar. Gentan er søgd at vera uttan fyri lívsvanda eftir at tan 13 ára gamli hevði stungið hana í búkin, skrivar ekstrabladet.dk

# na avleiðingar

h) Meskavíddin í hjáveiðiposanum í trolingini á landleiðini eigur at hækkast til 250 mm.

i) Bert skip og bátar, ið reka vinnuligan fiskiskap, sleppa at avreiða.

### Søguliga illa fyri

Fiskirannsóknarstovan sigur, at stovnarnir av toski á landgrunninum og á Føroyabanka eru søguliga illa fyri, hýsustovnurin er í skjótari minking, meðan upsastovnurin hinvegin er hampuliga væl fyri.

- Sera lítið er til av toski, gýtingarstovnurin á landgrunninum er tað minsta, hann hevur verið síðan 1961. Tí hevur toskurin alla verju fyri neyðini. Sama kann sigast um toskin á Føroyabanka. Hýsustovnurin minkar eisini skjótt, og veiðutrýstið fyri upsa er í hægra lagi. Neyðugt er við skerjingum av veiðutrýstinum, men ikki er neyðugt at skerja allar skipabólkar líka nógv, sigur stovnurin.

Støðan hjá botnfiskastovnunum er hættislig.

- ICES mælir til onga veiðu eftir toski og hýsu í 2009, og at royndin eftir upsa í 2009 verður skerd við 20%. Tað er eingin einføld loysn á trupulleikunum, og givið er, at skulu tiltøkini muna nakað, koma tey at merkjast í føroyskari fiskivinnu og samfelagnum annars.

Fiskirannsóknarstovan heldur, at landsstýrið eigur at umhugsa stig at linna avleiðingarnar og at eggja til at royna nýggjar leiðir.

### Størsti trupulleikin

- Størsti einstaki trupulleikin í løtuni er, at húkaflotin er alt ov stórur, og stig eiga at verða tikin til at minka um hendan partin av flotanum. Vit taka undir við, at gýtingargarstovnarnir eiga at verða størri eina minstustøðd, og at veiðutrýstið verður stillað so, at veiðan er burðardygg. Hetta er grundarsteinurin í okkara ráðgeving.

Fiskirannsóknarstovan hevur síðan dagaskipanin kom í gildi, víst á, at dagatalið alla tíðina hevur verið ov høgt, og at fiskiflotin hevur verið ov stórur.

- Tað er umráðandi í eini dagaskipan, at dagatalið er ásett soleiðis, at ikki ov ógvuslig sveiggj henda í veiðitrýstinum ár undan ári. Hetta 11-ára skeiðið hevur víst okkum, at veiðitrýstið okkurt árið hevur verið nærum dupult so stórt sum ætlað.

Stovnurin sigur, at ein partur av orsøkini stavar frá serligum umstøðum í náttúruni.

- Men menningin í eitt nú tøkni ger, at skipini so líðandi gerast effektivari. Hesum má fylgjast væl við og leggjast upp fyri, so ella so.



Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni

stovninum, og stórur fiskur er eisini betri egnaður í framleiðsluni.

- Tískil er væntandi, at meira fæst burtur úr við einum hóskandi enn einum ov stórum veiðitrýsti. Eisini kann væntast, at eitt hóskandi veiðitrýst gevur færri sveiggj í veiðini ár undan ári.

Fiskirannsóknarstovan vísir á, at tilgongdin av ungum fiski er ymisk ár undan ári.

- Summi ár er tilgongdin góð, onnur ár verri. Við harðari roynd verður fiskiskapurin góður, tey árini tilgongdin er góð. Men samstundis verður lítið og einki eftir til árini, tá tilgongdin ikki er góð.

Fiskirannsóknarstovan heldur samanumtikið, at við ov harðari roynd kemur minni upp á land í longdini, eins og sveiggini millum góð og ring ár verða alt ov ógvuslig.



*Um meira peningur ikki verður játtaður til bunkring, er vandi fyri, at norska rannsóknarskipið Johan Hjort verður lagdur 1. juli*

# Høgir oljuprísir ganga út yvir havgransking

**Tað er ikki bara í Føroyum, at høgu oljuprísirnir geva stovnsleiðarum og játtandi myndugleikum høvuðbrýggj**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri var nógv frammi um, at vaktar-og bjargingarskipini hjá Fiskiveiðieftirlitinum kanska fóru at verða løgd, um stovnurin ikki fekk meira pening til olju. Eftir togan aftur og fram gjørdi politiski myndugleikin av at loysa málið, so skipini kunnu vera siglandi.

Men tað er ikki bara í Føroyum, at rakstrarætlanir ikki halda, nú tað er vorðið so dýrt at bunkra skipini.

### Sama í Noregi

Norsk gransking av toski, lodnu, rækjum og havøkjum í Barentshavinum kann eisini verða skerd orsakað av høgum prísum á olju.

Hetta framgongur í einum brævi, sum norski Havgranskingarstovnurin hevur sent fiskivinnumyndugleikunum í Noregi.

Tað er Fiskeribladet-Fiskaren, sum ber hesi tíðindi.

Um einki verður gjørt fyri at útvega meira pening til bunkring, verður ransóknarskipið Johan Hjort ætlandi tikið úr sigling seinna hálvár í ár.

At bunkringarprísirnir eru øktir við 40% síðan ársbyrjan, ger, at Havgranskingarstovnurin hevur 6,5 miljónir norskar krónur fyri neyðini aftrat til olju, treytað av, at prísirnir ikki hækka uppaftur meira.

### Leggja 1. juli

Sum skilst, fer tað at ganga út yvir ein stóran part av ætlaða granskingarvirkseminum hjá Noregi í ár, um norski staturin ikki játtar Havgranskingarstovninum meira pening til bunkring.

Sparingarnar verða settar í verk longu 1. juli, um myndugleikarnir fyri ta tíð ikki hava funnið út av, hvussu figgjarligi parturin á hesum øki skal loysast.